# ítróttur

Nr. 109 • fríggjadagur • 13. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Bild:

## -Týska avrikið ein stór skomm

**BT skrivar, at Henrik Larsen nú kann sanna, at orðini hjá Gary Lineker um, at Týskland altíð vinnur, tá avtornar, eru sonn.**

ÚTLENDSKIR FJØLMIÐLAR
*Páll Holm Johannesen*




*Týska blaðið, Bild, fer illa við týska landsliðnum, eftir avrikið ímóti Føroyum mikukvøldi. Á forsíðini stendur, at hóast Týskland vann, so var avrikið stór skomm fyri Týskland*

Týska blaðið, Bild, fer ikki væl týska landsliðnum eftir avrikið ímóti Føroyum mikukvøldið. Í stórari yvirskrift stendur, at týska avrikið var ein stór skomm.

Teir siga seg ikki skilja, hvussu tað ber til, at HM-finalistarnir kunnu brúka 88 minuttir um at skjóta mál ímóti nummar 114 á altjóða styrkislistanum hjá UEFA. Týska liðnum manglar orku, vantar eina spæliskipan og framherjarnir eru fullkomiliga vandaleysir, sigur týska blaðið eftir dystin.

Úrslitið ímóti Føroyum dekkar ikki yvir vánaliga avrikið hjá týska landsliðnum ímóti føroyingum. Fjølmiðilin biður HM-finalistarnar taka seg saman, tí avrikini eftir HM í fjør hava verið út av lagi vánalig. Tekur týska landsliðið ikki annað skinn um bak, so kann plássið í EM-kappingini komandi summar vera í stórum vanda, sigur Bild.

### Sensatiónin lúrdi

Reuter skrivar eftir dystin, at týska landsliðið, sum hevur vunnið HM og EM tríggjar ferðir, var um reppi bara at fáa pínligan javnleik ímóti amatørunum úr Føroyum. Hevði tað ikki verið fyri Miroslav Klose, sum bjargaði týsku æruna, so hevði talan verið um eina rættiliga stórhending mikukvøldið.

Um dystin sigur Reuter, at føroyingar megnaðu ikki at skapa nakran málmøguleika, og at týskararnir høvdu leikliga yvirvág allan dystin. Uttan Michael Ballack vantaði Týskland ein leikara, ið kundi gera nakað eyka, og frammanfyri føroyska málinum vóru gestirnir klossuttir.

### Henrik kann taka Lineker upp á orðið

Danskir fjølmiðlar hava eisini varnast góða føroyska avrikið mikukvøldið. BT skrivar, at Henrik Larsen nú kann taka Gary Lineker á orðið, um at fótbóltur er eitt spæl við 22 leikarum, har Týskland altíð vinnur, tá avtornar.

Fjølmiðilin vísur á, at føroyingar stríddust manniliga, og við einum væl skipaðum liði, mundu teir veruliga tikið fótbóltsheimin á bóli. Kortini gjørdust teir ov stuttir, tí líkt týskarum, endaðu teir omaná, tá avtornaði. Ósigurin mátti kennast beiskur hjá føroyingum, sum enn einaferð vóru so nær við at skaka fótbóltsheimin.

Týsku leikararnir eftir dystin:

## Bólturin vildi bara ikki inn

**Týsku leikararnir eru á einum máli um, at teir eru nøgdir við úrslitið, hóast avrikið ikki var av tí besta**

FØROYAR-TÝSKLAND
*Páll Holm Johannesen*

Tað var ómøguligt hjá okkum at hitta nakran av týsku landsliðsleikarunum eftir dystin, og tí loyva vit okkum at endurgeva nakað av tí, teir hava sagt við týskar fjølmiðlar eftir dystin

**Liðskiparin, Oliver Kahn:**
-Vit spældu frammanfyri teirra mál í 90 minuttir, og vit høvdu eitt ótal av málmøguleikum, men inn vildi bólturin ikki. Av og á var eg bangin fyri, at dysturin fór at enda málleysur, og at vit bert skuldu fáa tað eina stigið við okkum heimaftur.

Eg havi spælt nógvar slíkar dystir sum í kvøld, har mótstøðuliðini hava verið undir stórum trýsti, og tað er altíð strævið at spæla slíkar dystir. Samanumtikið var hatta ikki ein av okkara bestu dystum, men úrslitið var á einari leið og vit liggja framvegis á odda í bólkinum.

**Christian Wörns:**
- Vit máttu bíða leingi, og eg var bangin fyri at vit ikki fóru at fáa øll stigini við okkum. Dysturin gjørdist júst so trupul, sum vit høvdu væntað frammanundan, og Føroyar høvdu ein eingil í málinum.

**Fredi Bobic:**
- Slíkan dyst hava eg aldrin spælt. Teir høvdu ein stóran múr frammanfyri málinum, og stríddust ótrúliga væl. Eg má bara takka Gudi, vit fingu bóltin í málið, og tað verður eisini tað einasta, eg fari at minnast av dystinum.

**Formaðurin í týska fótbóltssambandinum, Gerhard Mayer-Vorfelder:**
- Tá endin er góður, er alt gott. Dysturin endaði væl fyri okkara viðkomandi. Vit spældu væl betri enn ímóti Skotlandi, og høvdu átta til tíggju 100% málmøguleikar. Eg eri bara fegin um at vit fingu sigurin í hús.



*Við týskar fjølmiðlar eftir dystin, segði Bayern Munchen stjørnan, Oliver Kahn, at dysturin avgjørt ikki var av teimum bestu hjá týska landsliðnum, men samanumtikið var úrslitið á einari leið.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*





# Dysturin í Føroyum í Týsklandi



*Týsku áskoðararnir heima fyri skíggjarnar hildu seg hava lítið at reypa av, nú Kahn og hinar stjørnurnar úr stórveldinum við bit og slit fingu togað seg til sigurs móti lítlu Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eg eri í stóra býnum Stuttgart. Klokkan er ikki eitt enn, hitin er øgiligur, eini 33 hitastig. Frankfurter Allgemeine Zeitung, hevur eina mynd av føroyska málmanninum hjá føroyingum, tey kalla hann "Torwart Mikkelsen". Tað er mikudagur, eg fari inná eina Café vid eini rúgvu av bløðum og avísum. Í dag spæla týskarar í Føroyum.**

FÓTBÓLTSEYGLEIÐIN
*Kim Simonsen – Tübingen*

Eftir lestur í ein tíma, haldi eg at greinin hjá "Bild" ið annars er ein rein tabloidavís, er best í dag, við tveimum síðum, við mynd av týsku spælarunum á forsíðuni. Vegna føroyska ljósið um summarið er yvirskriftin "Kann Kahn síggja bóltin?", við eini stórari mynd av Oliver Kahn. (Kahn forvinnir yvir 42 milliónir euro um árið í løn). Greinin er stutt og er mest um ljósið í Føroyum um summarið, ið kann geva spælarnum trupulleikar at sova.

Ein onnur grein snýr seg um Henrik Larsen, ið helt, at føroyingar hava 20 % møguleika at vinna. Í liðuppsetingini hjá fólksliga blaðnum "Bild", gera tey nógv burturúr, at føroyingar eru lærarar, næmingar, lesandi, koyra ølbil og selja ís. Ein týskari segði mær, at hetta dámar týskarum sera væl, at tað júst eru púra vanligir fólk, ið spæla á føroyska landsliðnum, tí týsku spælarnir eru alt annað enn fólksligir lonur. Khan og Ballach forvinna t.d. meiri um árið enn føroyskur fótbóltur í eini 10 ár. Tað hjálpir ikki um støðuna, at ein týskur landsliðsspælari hevur sagt okkurt býtt um arbeiðsleys í Týsklandi.

### Tað eru tvær barrir í Føroyum

Í Havn eru tvær barrir, eitt diskotek, ein biografur og ein útvarpsrás, meinar Bild. Í vanliga heldur vil skapa sensatiónir enn at umboða sannleikan og veruleikan. Tað er stórur munur á t.d. FAZ (Frankfurter Allgemeine Zeitung), ið hevur eina góða grein um verkfallið í Føroyum, og bløðum sum Bild.

FAZ hava eisini tosa við russaran Ivan Eginson í Føroyum, ið flutti til Føroyar eftir 1:0 sigurin á Eysturríki í 1990. Nú er Ivan talsmaður fyri FSF. FAZ, tulka tó føroyskan fótbólt sum ein samanrenning ímillum veruleika og folklorismu, ið er heldur niðursetandi á ein hátt, tí teir ikki siga hvat teir meina við orðið "folklorismu". Gregor Derichs er fyri FAZ í Havn, har hann tosaði við m.a. Dánjal Andreasen, ið meinti at hetta var stórsti dysturin nakrantíð fyri Føroyar. Seinni gongur púra galið hjá hesum týska journalistinum, ið m.a. meinar at í Føroyum búgva 484.000 fólk. Hetta er vánaligt at eitt so kent og virt blað skrivar slíkar feilir

### Die Färöer gegen Deutschland

Seinni um kvøldið um sjeytíðina eri eg í ótrúliga kenda og hugnaliga universitetsbýnum Tübingen. Uttanfyri eru barrir ið lokka við fótbólti ímillum Týskland og Føroyar í kvøld. Fólk eru longu farin at seta seg frammanfyri stórskíggjar.

Eg keypti eina Neckarmüller Hefeweisse frá Tübinger Gästhausbräuerei. Tað er ótrúliga heitt um summarið í Suðurtýsklandi. Tey duga tó at taka sær av løttum við einari góðari øl. Eg fór víðari til eina fótbóltsbarr mitt í býnum, har tey bjóða stórskíggja. Her eru nógv meiri fólk. Klokkan er ikki meir enn hálvgun sjey enn, men uttanfyri stendur at í kvøld vísa tey Føroyar og Týskland. Eg fór tó áðrenn hetta inn á eitt stað at fáa okkurt til matna áðren dystin. Sjálvt staðið líktist onkrun úr Asterix og Obelix, ella eini vínstovu har Hitler og hansara vinir smíðaðu ætlanina fyri ølstovukvettið í 1924 í München. Her var bæði matur og vín framúrskarandi. Eitt stað uttan hug til stórum skeltum, slíkt hevði helst oyðilagt góða tónan á hesum stað. Eitt ótrúligt glas av Risling víni fekk eg afturvið verðanum. Fólk á hesum stað líkjast professarum ella doktarum í summeriskari, egyptologi, indoeuropeiskum ella fólk í familju við Thomas Mann.

### Nær byrjar dysturin?

Tað er sum um lívið skínur sterkari her suðuri, og tað er sum um tað er langt til Føroyar. Maðurin yvir av mær, líkist einum vínbónda, hann vildi bert drekka vín av einum serligum víngarði her í økinum. Tá eg tosaði við hann kendi hann alt til Føroyar, hann sat bert og bíðaði eftir at dysturin fór at byrja í kvøld. Hann var ikki vínbóndi men verkfrøðingur. Meðan vit tosaðu spurdi tænarin meg hvaðani eg kom. Hann hugdi eftir diktafonini og myndatólinum eg hevði við mær. Á borðinum lág ein diktafon og eitt stórt Canon kamera, ið ger tað torført at fella inní mongdina hjá einum ferðamanni.

### Dysturin byrjar

Týska sjónvarpið byrjaði við eini stuttari sending um Føroyar. Teir nevndu nakað um oyggjarnar, um verkfallið, at føroyingar hava væntað vøru leingi og ikki minst, at onkur hevur smuglað vørur til oyggjarnar meðan verkfallið hevur hildið á. Vit sóu enn einaferð John Petersen, bæði læra børn at lesa og arbeiðið við seyði. John hevur tókst myndaeydnu, tey dáma hann væl, hann riggar til nærum alt. Seinni sóu kanska eini 20 milliónir fólk gummibátar og rok um vørur í Føroyum, hetta í týska Statssjónvarpinum. Teir vístu eisini myndir at donsku løgreglufólkunu, ið vóru komin til oyggjarnar.

Ein samrøða var við Henrik Larsen, ið var á týskum. Oliver Kahn segði okkurt um vánaligt veður og speakarin fyri Týskland lat illani at, meðan syrgitónleikur ljóðaði. Hjálparvenjarin Skibbe royndi at siga okkurt, meðan hann tosaði byrja føroyingar at syngja týska tjóðsangin, har Brandur Enni sang fyri. Millum brotini komu stuttar lýsingar fyri Bitburger øl, ið segði seg hava stuðla týska landsliðnum.

Lagi var gott í hesi barrini. Týskarar byrjaðu væl, men føroyska verjan var ótrúliga góð. Eingin skilti at týskarar kunnu vera so óeydnusamir í einum dysti. Eftir 33 minuttir vóru týskarar í hesi barrini ikki so larmandi meiri. Meiri bangnir.

Vit sóu Týskland tapa møguleikar, meðan Ballack sat á beinkinum. Eftir eini 15 ella 23 málmøguleikar fingu týskarar tó mál í hvat eg helt vera 84.minutti. Hetta er sera vánaligt av eini so stórari fótbóltstjóð, ið hevur eini tíggju túsund ferð størri tilgongd av nýggjum talentum enn vit hava í Føroyum hagfrøðisligani sæð.

Týskarnir vóru stillir í kvøld og søgdu einki einki, teir vistu eg var úr Føroyum, Men seinni vóru teir glaðir, tá fysta málið kom. At eitt mál skuldi koma afturat var óluksáligt.

### Føroyingar virdir

Saman um tikið eru føroyingar virdir her niðri millum fólk við skili fyri fótbólti, sum ein verulig Fótbóltstjóð millum aðrar. Sjálvandi vil Týskland vinna, men ikki var tað lætt í gjár, føroyingar bardust sum vargar um hvønn bólt.

Fólk hava nú stóra virðing fyri føroyingum eftir hetta avrik, ið kundi kosta týskarum 0:0 støðuna, ið dysturin nærum endaði við. Teir høvdu meiri málmøguleikar og stóran part av spælinum, men kláraðu illani at bróta føroysku verjuna.

Tá dysturin var liðugur tosaði eg við fleiri týskarar, ið vóru sera illani við at vána týska spælinum. Á veg heim vóru nógv fólk í býnum, ið høvdu týskar litir í høvdinum og týsk fløgg, men tey vóru friðarlig og søgdu seg hava lítið at reypa av.